# Barna- og útbúgvingarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 07.02.23 |
| Mál nr.: | 21/21710 |
| Málsviðgjørt: | SJ/OYS |
| Ummælistíð: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**fyrsta byggistig at høvuðsumvæla og umbyggja skúlanbygningarnar á Frælsinum**

**§ 1.** Landsstýrismanninum verður heimilað at skipa fyri, at partar av skúlabygningunum á Frælsinum verða høvuðsumvældir og umbygdir. Byggiútreiðslurnar kunnu í mesta lagi verða 24 mió., kr. íroknað projektering og innbúgv.

**§ 2.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi 1. Januar 2025.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Endamálið við uppskotinum er at heimila landsstýrismanninum at skipa fyri, at skúlabygningarnir á Frælsinum í Tórshavn verða høvuðsumvældir og umbygdir, og verða at nýta sum seturskampus hjá Fróðskaparsetur Føroya.

Uppskotið er liður í at fyrireika eina framtíðarætlan fyri Fróðskaparsetur Føroya. Kampusbólkurin hevur í kampusætlanini mælt til, at staðsetingin av kampus verður á Frælsinum og økinum rundanum í Tórshavn, tí økið hevur tætt tilknýti til býin, bókasavn og aðrar vitanarstovnar sum t.d. Havstovuna, Vinnuháskúlan, Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, Landsskjalasavnið, Tjóðsavnið, Føroya Fólkaháskúla og Jarðfeingi.

Kampusbólkurin metir somuleiðis, at bygningarnir á Frælsinum, tá teir eru høvuðsumvældir og umbygdir, kunnu blíva væl virkandi undirvísingar- og skrivstovuhølir. Í skrivandi stund verða partar av ognunum nýttir til virksemi hjá Námsvísindadeildini á Setrinum, og er talan sostatt um hølir, ið Setrið longu hevur góðan kunnleika til. Kampusbólkurin hevur tískil mælt til, at neyðugu ábøturnar og umbyggingarnar verða framdar á ognunum, soleiðis at tær gerast ein integreraður liður í samlaðu kampusverkætlanini.

Landsverk hevur fyrireikað eitt uppskot til íløguætlan, har mælt verður til, at ognirnar á Frælsinum verða umvældar, høvuðsumvældar og umbygdar í fleiri stigum í tíðarskeiðnum 2022 – 2029. Hóast verkætlanin ikki er prosjekterað ella boðin út, hevur Landsverk gjørt eina varliga meting av verkætlanarkostnaðinum, ið er mettur til umleið 144 mió. kr., í hesum tíðarskeiði.

Metti kostnaðurin av at fremja hetta stig í verkætlanini í 2023, tað er at høvuðsumvæla lon 5 og at fyrireika høvuðsumvæling av lon 1, er 24 mió. kr., sbrt. íløguætlanini hjá Landsverk. Samlaða játtanin fellur í takt við, at einstøku lonirnar verða umvældar. Landsverk metir, at útreiðslurnar fara at fella soleiðis yvir ár:

**2023**: Høvuðsumvæling av lon 5, og fyrireiking av høvuðsumvæling av lon 1- 24 mió. kr.

**2024**: Lon 1 framhald og Lon 6 fyrireiking og byrjan , høvuðsumvæling - 24 mió. kr.

**2025-2029**: Lon 6 framhald og Lon 2, 3, 4, 7, 8 og 9, høvuðsumvæling liðuggerð - 86 mió. kr.

Eftir ætlan verður tað í ár farið í holt við at fyrireika og fremja fyrsta partin av høvuðsumvælingini, tað er at allir bygningslutir, frá lendisgólvi til tekju, verða eftirhugd og umvæld, at klimaskermur, tak og framsíðir verða tettar og dagførdar samsvarandi dagsins orkukrøvum, at nýggj ventilatión verður sett upp, og at bygningurin verður dagførdur í mun til galdandi brunakrøv.

Tá ið nevndu fyrireikingarnar, umvælingarnar og høvuðsumvælingarnar eru framdar, verður ætlan gjørd fyri umbygging av pørtum av ognunum til felagshølir, bólkarúm, lesisal v.m. Hetta

er neyðugt til tess at gera umhvørvi stimbrandi fyri lesandi og starvsfólk á Setrinum, eisini tá ið undirvísing ikki er.

**Verandi hølisviðurskifti hjá Fróðskaparsetur Føroya**
Í skrivandi stund húsast Náttúruvísindadeildin og Deildin fyri heilsu- og sjúkrarøktarfrøði (DHS) í trimum leigaðum hæddum í Sjóvinnuhúsinum (SVH) á Vestaru Bryggju, ið Tórshavnar havn eigur. Samlaða talið av lesandi, Ph.d-lesandi starvsfólkum á Setrinum, sum eru knýtt at hølunum í Sjóvinnuhúsinum, er uml. 410.

Leigusáttmálin við Tórshavnar havn er tíðaravmarkaður til 10 ár, og fer leigusáttmálin úr gildi í seinasta lagi tann 1. september 2027. Leigumálið kann tó sigast upp av báðum pørtum við 12 mánaða fyrivarningi. Tórshavnar kommuna hevur boðað frá, at kommunan ætlar at nýta hølini í Sjóvinnuhúsinum til kommunalu fyrisitingina. Væntast kann tískil ikki, at leigumálið í Sjóvinnuhúsinum verður longt, og er Setrið tískil í einari viðkvæmari støðu hvat hølisviðurskiftum viðvíkur.

Kanningarnar hjá kampusbólkinum vísa, at um skúlabygningarnir á Frælsinum 20 verða høvuðsumvældir og umbygdir, kann mest átrokandi hølistørvurin loysast, eins og lagt verður upp til, at alt virksemi hjá Setrinum í framtíðini verður miðsavnað á Frælsinum. Kampusbólkurin metir, at partar av verandi virksemið í Sjóvinnuhúsinum rúmast inni í Venjingarskúlanum, og at Fróðskaparsetur Føroya kann taka partar av ognunum í nýtslu, meðan verkætlanin stendur á, soleiðis at alt virksemi hjá Setrinum í Sjóvinnuhúsinum vónandi er flutt niðan á Frælsið medio 2025.

Skúlabygningarnir á Frælsinum rúma ikki øllum virkseminum sum nú er í SVH, og tískil mugu aðrar hølisloysnir finnast fyri at yvirhalda tíðarætlanina og tryggja virksemi hjá Setrinum. Eitt boð uppá loysn, er at seta fyribils hølir (“bingjur”) til vísindastarvsfólk upp millum lonirnar á Frælsinum, svarandi til uml. 40 skrivstovupláss á 25 m2 brutto. Mett verður, at hendan loysn krevur meiri fyrireiking, og er ein møguligur meirkostnaður, ið stendst av keypi ella leigu av fyribils hølum, ikki íroknaður í hesum uppskotið.

Fyrsta stig í verkætlanin var framt í 2022, eftir at játtaðar vóru 1,2 mió. kr. afturat verandi játtan til kampusverkætlanina, og fevndi hetta um ymsar léttari ábøtur á lon 4 og 7. Landsverk metir, at verkætlanarstigini fyri 2023 kunnu fara í gongd alt fyri eitt, treytað av, at Løgtingið setir neyðugu játtanina av til endamálið.

**Ognarviðurskiftini – ognirnar á Frælsinum**
Verkætlanin fevnir um ognirnar á Frælsinum, ið áður hoyrdu gamla Venjingarskúlanum og Føroya Læraraskúla til, tað er, matr. nr. 1017d og 1038b, ið landið sambært tingbókini eigur 60% av í samogn við Tórshavnar kommunu, umframt lonina á matr. nr. 1031a, ið kommunan eigur einsamøll. P/F Skyn hevur mett um virðið á hesum ognum, og er samlaði ognarluturin hjá Tórshavnar kommunu mettur at hava eitt virði á góðar 44,9 mió. kr.

Landið, umboðað av Uttanríkis- og mentamálaráðnum (nú Barna- og útbúgvingarmálaráðnum), og Tórshavnar kommuna hava gjørt treytaða avtalu um keyp og sølu, har landið eftir ætlan keypir matr. nr. 1017d umframt ognarlutin hjá kommununi í matr. nr. 1031a, í alt uml. 13.246m2, móti at landið selur kommununi partar av matr. nr. 18 og 19 í Hoydølum, undir hesum auluna, skúlabygningin, ítróttarhøllina og barakkina á Sanatoriivegi 11, 13, 15 og 17, í mesta lagi 12.500m2, og verða partar av hesum ognum eftir ætlan býttir sundur og lagdir saman í ein nýggjan matrikul, ið kommunan kemur at eiga.

Sambært virðismetingini hjá P/F Skyn hava nevndu ognir í Hoydølum eitt samlað virði á góðar 37 mió. kr.

Avtalan er treytað av, at Setrið megnar at flyta alt sítt virksemi úr Sjóvinnuhúsinum við árslok 2024, og at landið rindar Tórshavnar kommunu munin á góðar 7,9 mió. kr., harav 4,2 mió. kr. eru íløgur, ið landið hevur gjørt í leigumálið í Sjóvinnuhúsinum.

Partarnir eru tilvitaðir um søguliga virðið, ið landsins ognir í Hoydølum hava, og eru partarnir tískil komnir ásamt um høvuðstættirnir í einari endaligari avtalu um keyp og sølu. Treytaða avtalan fevnir tískil ikki um skógarøkið, gula Sanatoriibygningin, ella aðrar bygningar á matr. nr. 19, eins og tað ein treyt, at møgulig til- ella umbygging av ognunum í Hoydølum, ið landið eftir ætlan letur kommununi, skal halda seg til verandi bygningar á Sanatoriivegi 11, 13 og 15. Tað er somuleiðis ein treyt, at bygging ikki má fara fram á tí partinum av nýggi ognini, ið áður hoyrdi matr. nr. 18 til (undir hesum á fløtuni), at bygningarnir í Hoydølum verða at nýta til almannagagnligt kommunalt endamál, og at ognirnar ikki mugu avhendast ella nýtast til annað endamál.

Í uppskotinum til broyting í løgtingslóg um bráðfeingis fíggjarlóg fyri 2023 er biðið um heimild at fremja avtaluna millum land og kommunu. Um Løgtingið gongur hesum ynski á møti, eru formligu fortreytirnar fyri, at landið kann taka ímóti ognunum hjá kommununi loknar.

Hinvegin eru tó ymisk viðurskifti viðvíkjandi landsins ognum í Hoydølum, ið enn ikki eru endaliga avgreidd. Millum annað skal byggisamtyktin fyri økið broytast, støða skal takast til eina byrðu á matr. nr. 18, ið landið hevur latið lýsa á ognina, og skal Umhvørvisstovan síðani geva loyvi til at fremja sundurbýti og samanlegging av nevndu ognum.

Til tess at landið skal megna at halda avtalaðu tíðarætlan, ber ikki til at bíða til hesi viðurskiftini eru endaliga avgreidd. Tískil verður mælt til, at landið, við loyvi frá Tórshavnar kommunu, fer í holt við at høvuðsumvæla og umbyggja Venjingarskúlan í 2023, hóast viðurskiftini viðvíkjandi landsins ognum í Hoydølum enn ikki eru endaliga avgreidd.

Um so er, at matrikulviðurskiftini vísa seg at vera ein forðing í mun til ætlaðu avhendan av landsins ognum í Hoydølum, so eru landið og Tórshavnar kommuna í avtaluni komin ásamt um, at partarnir skulu samráðast um nýggjan leist. Eitt uppskot til alternativan leist er, at landið keypir ognarlutin hjá Tórshavnar kommunu í Venjingarskúlanum, við reiðum peningi, tað er góðar 37 mió. kr.

**Samanumtikið**
Kampusbólkurin mælir til, at ein stýrisbólkur við umboðum frá Fróðskaparsetrinum, Landsverki og Barna- og útbúgvingarmálaráðnum á hvørjum ári ger eina raðfesting av, hvat skal verða gjørt í árinum, og fylgir hesum upp, so tað verður gjørt.

Mett verður, at uppskotið, um tað verður samtykt, fer at betra um hølisviðurskiftini og tískil um námsfrøðiligu karmarnir á Fróðskaparsetur Føroya, eins og ein miðsavnan av virkseminum hjá Setrinum fer at økja um sosiala samanhaldi hjá lesandi og starvsfólkum.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**

Endamálið við lógaruppskotinum er at geva landsstýrismanninum heimild at játta upp til 24 mió. kr. til at skipa fyri, at partar av skúlabygninginum á Frælsinum verða høvuðsumvældir og umbygdir, og svarar hendan upphædd til metingina hjá kampusbólkinum fyri 2023.

Samlaða verkætlanin má fremjast í fleiri stigum, og verður mett at uml. 144 mió. kr., mugu verða settar av í árunum 2022 – 2029.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Uppskotið er fyrsti liður í at umvæla, høvuðsumvæla og umbyggja skúlabygningarnar á Frælsinum 20, ið áður hoyrdu gamla Venjingarskúlanum/Skúlin á Fløtum og Føroya Læraraskúla til, og skulu ognirnar eftir ætlan nýtast sum seturskampus hjá Fróðskaparsetur Føroya.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Uppskotið var sent Fíggjarmálaráðnum, Landsverki, Tórshavnar kommunu, Fróðskaparsetur Føroya.

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Samanlagt er verkætlanin mett at kosta áleið 144 mió. kr. Eftir ætlan skulu 10 mió. kr. setast av til verkætlanina í 2022, 24 mió. kr. í 2023, 24 mió. kr. í 2024 og uml. 86 mió. kr. í tíðarskeiðinum 2025-29. Lógaruppskotið er lagt fram samsvarandi játtanarskipan landsins, har meginreglan er, at størri løguverkætlanir upp á 10 mió. kr. ella meira, skulu gerast við grundarlagi í einari verklagslóg. Landsstýrismaðurin biðir tískil við hesum uppskoti um neyðugu heimildina til at játta upp til 24 mió. kr.

Um leigumálið hjá Fróðskaparsetur Føroya í Sjóvinnuhúsinum verður sagt upp, verður árliga leigan á kr. 4.573.212,50,- spard.

Áogn landsins fyri gjørdar íløgur í Sjóvinnuhúsinum á uml. 4,2 mió. kr. verða mótroknaðar í keypspeninginum fyri skúlabygningarnar á Frælsinum.

Landsverk hevur mett, at tá ið bygningarnir eru settir í stand, skulu uml. 175-200 kr./m2 setast av um árið til viðlíkahald, tað er í alt uml. 1,5 – 2,0 mió. kr. um árið[1].

Á eykajáttanini til fíggjarlógina fyri 2022 eru settar av 1,1 mió. kr. til gjøld til Umhvørvisstovuna ísmbv. at søkt verður um loyvi at fremja sundurbýti og samanlegging av landsins ognum í Hoydølum, ið eftir ætlan verða latnar Tórshavnar kommunu.

Til tess at Setrið skal megna at flyta virksemi út úr Sjóvinnuhúsinum samsvarandi tíðarætlanini, verður møguliga neyðugt at seta fyribils hølir upp á ognini (“byngjur”), framt til uml. 2027. Hetta er ein leistur, ið krevur meiri fyrireiking, og er ein møguligur meirkostnaður, ið stendst av keypi ella leigu av fyribils hølum, ikki íroknaður í hesum uppskotið.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**

[1] Støðufrágreiðing um kampusætlanina, bls. 9.

Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Lógaruppskotið kann fáa jaligar avleiðingar fyri vinnuna vegna økt byggivirksemi.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Venjingarskúlin verður umvældur, høvuðsumvældur og útbygdur samsvarandi galdandi regluverkið innan bygging, og sum fyriheldur seg til ávísa burðardygd í bygging, t.d. í mun til nútímans orkukrøv. Ein burðardygdarætlan verður ment í samband við verkætlanina.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Lógaruppskotið er liður í at fremja eina samlaða kampusverkætlan á Frælsinum í Tórshavn.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Tá ið Venjingarskúlin er høvuðsumvældur og nútíðargjørdur, fær hetta væntandi positivar avleiðingar fyri lesandi og starvsfólk á Fróðskaparsetur Føroya, av tí at uppskotið hevur við sær, at fysisku karmarnir kring Setrið batna.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri nakran millumtjóðasáttmála.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri tvørgangandi sáttmálar.

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Tað er einki í lógaruppskotinum, sum ikki sampakkar við Løgtingslóg nr. 66 frá 18. mai 2006 um at seta í gildi Hoyvíkssáttmálan Sáttmáli millum stjórn Íslands, øðrumegin, og stjórn Danmarkar og Føroya landsstýri, hinumegin.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**
   Tað er einki í lógaruppskotinum, sum ikki sampakkar við Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneske-rettighedskonvention.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
   Í kampusverkætlanini verða atlit tikin til atkomu til útbúgvingartænastur fyri øll.

**2.9. Markaforðingar**
Lógaruppskotið elvir ikki til markaforðingar,og ongar kendar markaforðingar eru á økinum.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til onnur, men heimilar at landskassin fíggjar verkætlanini at umvæla og høvuðsumvæla Venjingarskúlanum á Frælsinum í Tórshavn.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Ja | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Ásetingin gevur landsstýrismanninum materiella heimild til at skipa fyri, at Venjingarskúlin verður umvældur og høvuðsumvældur. Útreiðslurnar fyri fyrsta byggistigi kunnu í mesta lagi vera 24 mió. kr. íroknað útreiðslur til forkanningar og prosjektering.

**Til § 2**
Vanlig áseting um gildiskomu. Lógin fer úr gildi 1. Januar 2026, tá ið samtykta játtanarskeiðið er av og fyrsta byggistigi væntandi er liðugt.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, dagfesting

**Djóni Nolsøe Joensen**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1:
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: